# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Magnus Egholm** fer til gravar úr Vesturkirkjuni mikudagin 27. juni klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

**Hans Mortensen, Sørvágur**, fer til gravar úr Kedron mikudagin 27. juni klokkan 13:30.

**Jónhard Johannesen, Skála**, andaðist 25. juni 37 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Róland Høgnesen**, kondittari, ættaður av Norðoyri búsitandi í Hoyvík, andaðist 25. juni 57 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Jutta Hansen í Fuglafirði**, ættað úr Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi leygardagin, 84 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrshúsi týsdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 14 úr Fuglafjarðar kirkju. Tey, ið vilja minnast Juttu, kunnu lata eina peningagávu til Fuglafjarðar kirkju. Kotno í peningastovunum.

**Óli Thomsen í Stórustovu í Skúvoy**, andaðist mánadagin, 78 ára gamal. Jarðarðarerðin verður úr kirkjuni hósdagin klokkan 12. Tey, ið vilja minnast Óla kunnu lata eina peningagávu til Skúvoyar kirkju. Konto í Eik banka. Í sambandi við jarðarferðina siglir Sildberin av Sandi klokkan 10:30.

**Hans Jacobsen**, vanliga nevndur Hans hjá Simonu, ættaður úr Hvalba, andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi leygardagin 23. juni, 87 ára gamal. Farið verður úr kapellinum mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Hans við blómum ella kransi kunnu í staðin lata Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi eina gávu. Konto í peningastovunum.

**Jógvan Petersen, Tórshavn**, fer til gravar úr Havnar kirkju mikudagin klokkan 13. Bønarhald verður í Havnar kirkju týsdagin klokkan 18.

**Anna Simonsen, Tórshavn** andaðist á Lágargarði, leygardagin, 23. juni, 77 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

†

Kunngjørt verður, at elskaða mamma, vermamma, omma og systir okkara

**Anna Simonsen**
Tórshavn

andaðist á Lágargarði leygarkvøldið 23. juni, 77 ára gomul.
Kistan fer av Lágargarði hóskvøldið 28. juni kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin 29. juni kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Mortan, Vígdis og Jan**

Tey, ið vilja minnast Onnu, kunnu lata eina peningagávu til Lágargarð. Konta í peningastovnunum.

Fyri 35 árum síðan:

# Skipsføraraprógv í 1972



Í juli 1972 tóku hesir skipsføraraprógv á Føroya Sjómansskúla: Salmun Bech, Porkeri, Eigil Fagraberg, Miðvágur, Hegin Sevdal, Leirvík, Petur Marni Thomsen, Tórshavn, Jeffri Vinther, Syðrugøta, Trygvi Jacobsen, Sandavágur, og Eyðun Mørkøre Simonsen, Klaksvík,

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1972*

Lesið Sosialin - so eru tit við

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið vístu samkenslu, tá elskaða mamma, vermamma og omma okkara

**Sylvia Gunnarsson**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Zarepta.
Takk til starvsfólkið á »Heiminum við Vallalíð« og á G4.
Takk til tykkum øll, ið hjálptu til og sýndu beinasemi í samband við jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Eirikur, Ingunn, Randi og Victor**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri

**Mogens Egholm**
ættaður úr Tórshavn
búsitandi ved Ringe

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri gávur til Tambar.

*Vegna tey avvarðandi*
**Elin**
**Sigga, Ása og Magnus við familjum**

**Dagurin**

**27. juni. Sjey sovarar.** Halgisøgan sigur frá, at tá ið keisarin Decius legði eftir teimum kristnu, leitaðu sjey ungir menn sær skjól í einum helli í fjøllunum. Hellið, teir krógvaðu seg í, varð funnið, og stórir steinar settir fyri inngongdina, so at teir skuldu svølta í hel. 200 ella 300 ár seinni vórðu steinarnir tilvild veltir frá munnanum, og teir sjey vaknaðu við sítt fríska lív uttan at vita, hvussu leingi teir høvdu sovið.